Vit kunnu bjóða
reiðaríum, bátaeigarum, skipasmiðjum/verkstøðum og øðrum áhugaðum
ráðgeving, vegleiðing, tekniska hjálp og avgreiðslu innan:

· Nýbygging
· Umbygging
· Umvæling
· Skipasýniskrøv
· Klassakrøv
· Myndugleikakrøv

spf. Sjótek Faroe Islands
ráðgevandi skips- og maskinverkfrøðingar

Leitisvegur, 625 Glyvrar
Tel 44 79 42 · Fax 44 94 01
Mobil 21 79 42
sjotekjp@post.olivant.fo

Boks 40, 490 Strendur
Tel 44 71 63 · Fax 44 94 00
Mobil 21 41 81
sjotekoj@post.olivant.fo

spf Sjótek er stovnað 1992 sum ráðgevandi skipsverkfrøðingafyritøka. Endamálið er at veita ráðgeving og vegleiðing innan skipasmíð, bæði tá ið tað snýr seg um nýbygging, umbygging og umvæling. Við meira enn 30 ára royndum innan økið á bæði føroyskum og útlendskum skipasmiðjum hava vit hollan kunnleika til nýbygging, umbygging og umvæling. Vit hava royndir við nýbygging av meira enn 50 skipum umframt royndir við umbygging og umvæling av hópin av skipum.

team85



www.hestprent.fo

Telefonsøla kl 10.00
Gólvsøla kl 11.00

Fiskamarknaður Føroya
URL: www.fmf.fo • e-mail: fmf@fmf.fo

FO-650 Toftir
Tel +298 41 41 41
Fax +298 41 41 42

FO-900 Vágur
Tel +298 37 49 99
Fax +298 37 48 88

FO-800 Tvøroyri
Tel +298 37 28 37
Fax +298 37 28 38

FO-700 Klaksvík
Tel +298 45 69 99
Fax +298 45 69 33

FO-380 Sørvágur
Tel +298 33 23 95
Fax +298 33 23 88



RUNAVÍKAR HAVN



www.runavik.fo

Runavíkar Havn veitir tænastur innan fiskivinnu, umframt oljuvinnu,farmaflutning og ferðavinnu

RUNAVÍKAR HAVN · TEL 44 70 15 · FARTEL 22 51 14
FAX 44 89 20 · VHF KANAL 16 · WWW.RUNAVIK.FO

Sosialurin 34300



P/f Ídnaðartøkni
www.skf.fo

Nýtt nummar
Tlf: 444 830
Mobil 223 821 Fax: 444 831
www.skf.fo

Gates
LINCOLN

SKF Distributor
P/F Ídnaðartøkni




# Línubátarnir forrenta lítla skuld



*Hóast gongdin hjá línuskipunum ofta verið tikin fram, sum tann mest positiva innan føroyska ísfiskavinnu í løtuni, so stóð tað ikki meira enn upp og niður hjá Stapanum seinasta ár, sigur reiðarin, Anfinn Olsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Hýrusáttmálarnir hjá línubátunum eru so dýrir, at hesir saman við høgum agnútreiðslum gera, at línubátarnir forrenta onga skuld, sigur Anfinn Olsen, reiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú upsaprísurin er lágur, og útlitini hjá partrolarunum ikki eru serliga bjørt, hevur ofta verið havt á lofti, at línuskipini teljast millum tey, sum standa seg best.

Og ivaleyst er tað rætt.

Men hetta er ikki øll søgan, sigur Anfinn Olsen, reiðari.

Hann sigur, at hóast tíðin hevur verið við línuskipunum seinastu árini, so vita teir, sum fáast við línu, at hesi skipini renta lutfalsliga lítla skuld.

Anfinn vísir á, at hýrusáttmálin er rættiliga kostnaðarmikil fyri hesi skipini, og haraftrat kemur, at agnið er rættiliga dýrt.

### Melur bara

Hann sigur, at raksturin hjá línuskipinum, Stapanum, sum kom higar til lands fyri gamla Stapan í 2002, so dánt hekk saman í fjør, hóast fiskiskapurin hevur verið hampiliga góður.

– Tá ið hetta er tann parturin av ísfiskavinnuni, sum kanska hongur eina frægast saman, er ikki nógv at geva av.

Anfinn Olsen heldur tí ikki, at línuskipini forrenta nakra serliga skuld, soleiðis sum umstøðurnar hjá hesum skipum eru.

# Akraberg og Høgaberg hanga saman

**Anfinn Olsen, reiðari, veit at siga, at bæði pelagiski trolarin, Høgaberg og verksmiðjutrolarin, Akraberg, stóðu seg seinasta ár**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Høgaberg fiskar í løtuni svartkjaft í føroyskum sjógvi. Teir byrjaðu fyrst í hesum árinum í ES-sjógvi, síðan royndu teir í altjóða sjógvi, og úr føroyskum sjógvi fara teir væntandi í íslendskan sjógv at royna eftir svartkjafti ella sild.

Longu nú hava føroysk skip gjørt túrar eftir svartkjafti í íslendskum sjógvi, og Saksaberg hevur eisini verið fyrsta túrin á sild.

– Hvat Høgaberg fer at gera, tá ið farið verður úr føroyskum sjógvi, veldst um, hvat hildið verður roynist best, sigur Anfinn Olsen, reiðari.

### Góð 60 oyru

Reiðarin veit at siga, at prísurin fyri ídnaðarfisk á Havsbrún hevur seinastu tíðina ligið rundan um 60 oyru fyri kilo, og tað er tað, sum roknast kann við hesa tíðina av árini, nú svartkjafturin hevur gýtt og er rak.

– Vanliga fellir prísurin nakað, tá ið fiskurin gerst rak, tí proteininnihaldið minkar, og minni fæst burtur úr fiskinum.

Anfinn sigur, at prísurin á ídnaðarfiski í Føroyum vanliga liggur millum prísirnar í Íslandi og prísirnar í Noregi.

Í Íslandi eru fleiri virkir, sum keypa ídnaðarfisk, men í Føroyum er so bert tað eina.

– Kortini fáa vit altíð betri prís í Føroyum, enn skipini fáa í Íslandi.

Spurdur, hví prísurin í Føroyum er lægri enn í Noregi, sigur Anfinn, at tað dugir hann ikki rættiliga at siga.

### Fiskar kongafisk

Verksmiðjuskipið hjá Anfinni og øðrum, Akraberg, er í løtuni í Irmingarhav-inum á kongafiskaveiði.

Reiðarin sigur, at fiskiskapurin hevur verið hampiligur, men hann væntar ikki, at túrarnir har yviri verða so nógvir, tí eini fýra føroysk skip eru á leiðini, og kvotan fer at ganga undan, áðrenn langt um líður.

– Hetta er annars besta tíðin í Irmingarhavinum, og Akraberg liggur um eini 16-19 tons av lidnari vøru um samdøgnið.

Anfinn Olsen sigur, at einaferð til heystar fer Akraberg eystureftir at royna.

Bæði Høgaberg og Akraberg hingu saman fíggjarliga seinasta ár, og reiðarin væntar, at hetta árið eisini verður á eini leið.

## Íslendskt dóttirfelag í Kina

**Ísland/Kina:** Íslendska framleiðslu- og sølufelagið, Icelandic Group, hevur stovnað eitt dóttirfelag í kinverska býnum, Qingdao.

Málið hjá felagnum er at innflyta rávørur og útflyta lidnar vørur, samstundis sum dóttirfelagið eisini fer at leita eftir samstarvshugaðum framleiðarum í Kina.

Íslendska felagið fer eisini at byggja víðari á tað samstarv, sum longu er millum íslendingar og kinverskar framleiðarar.

Í seinastuni hevur ljóðað, at eitt nú norðmenn senda fisk til Kina at framleiða. Fiskurin verður síðan seldur aftur á evropeiska marknaðinum við góðum vinningi, tí arbeiðsorkan í Kina er so bílig.

Í samrøðu við Sosialin fyrr í ár, segði Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, at norsk reiðaríir, sum fiska eystanfyri, eisini senda heilan fisk til virkingar í Kina og selja hann aftur í kapping við eitt nú tann fiskin, sum føroysku flakatrolararnir veiða og framleiða.

Hugsandi er, at íslendska felagið, Icelandic Group, eisini hevur fingið eyguni upp fyri hesum møguleika í Kina.

**-vj.**

## Veðurlagsbroyting er orsøkin

**Norðsjógvurin:** Nakrir bretskir granskarar halda, at veðurlagsbroyting er ein týðandi orsøk til, at eingin fiskur er at fáa í Norðsjónum.

Tað er blaðið, Nature, sum ber hesi tíðindi.

Granskarar halda, at veðurlagsbroytingar í Norðsjónum og í havøkjunum rundan er ein minst líka so týðandi orsøk til fiskaloysi, sum sjálv veiðan hevur verið.

**-vj.**

## Samherji verri úrslit í 2003



*Samherji eigur ein triðing av felagnum, Framherji, sum eigur verksmiðjutrolaran, Akraberg og nótaskipið, Høgaberg*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Ísland:** Íslendska fiskivinnufelagið, Samherji, hevði í fjør eitt yvirskot fyri skatt uppá 104 miljónir krónur. Sammet við úrslitið árið fyri, er hetta ein minking í yvirskotinum uppá stívliga stívliga 90 miljónir krónur. Samlaði umsetningurin, sum var 1,06 miljardir krónur í 2003, minkaði við tilsamans 60 miljónum krónum í mun til árið fyri.

Orsøkin til versnandi úrslitið, er sambært felagnum, at veiðan hjá skipunum hevur verið minni, og somuleiðis hevur styrkta krónuvirðið eisini havt sína ávirkan á gongdina.

Sambært yvirliti, sum Íslandsbankin hevur gjørt, er Samherji kortini virðismesta fiskivinnufelagið í Íslandi. Samherji hevur nevniliga eitt marknaðarvirði, sum svarar til stívliga 1,6 miljardir krónur í okkara peningi. Á øðrum plássi er felagið, Grandi, sum er virðismett til eina slaka miljard krónur.

**-vj.**